


www.oljan.fo

**Jan Müller** 28 - 01 - 2013

# Aftur eitt álop á oljuvinnuna í Algeria

Myndugleikarnir í Algeria siga seg hava varhugan av, at víðgongdir islamistar hava gjørt eitt álop afturat á oljuvinnuna í landinum. Hesaferð søktu ókendir menn at einari oljurørleiðing 70 kilometrar eystan fyri høvuðsstaðin, Algier. Sambært trygdartænastuni doyðu tveir algerskir vaktarmenn í álopinum, og sjey fólk vórðu særd. Álopið var á landspartinum Djebahia, sum ber orð fyri at vera eitt av høvuðsøkjunum hjá teirri algersku deildini av Al Qaeda. Hetta er annað álopið á oljuvinnuna í Algeria í hesum mánaðinum. Tað fyrrs var á gassverkið In Aménas, har víðgongdir islamistar myrdu nógvar útlendskar gíslar, teirra millum fimm norðmenn, sum arbeiddu hjá Statoil. -Álopið á rørleiðingina er ein lítil hending samanborið við tað, sum hendi í In Aménas, sigur ein algersk trygdarkelda við Reuters.